# Bárður Nielsen

Bárður Nielsen varð fyri fyrstu ferð valdur á ting, og hann ætlar sær beinanvegin at fara til verka.

Hann gjørdist fyrst valdur á listanum hjá Sambandsflokkinum við 196 persónligum atkvøðum. Bróðurparturin av hesum komu í heimbygd hansara, Vestmanna.

Til spurningin, hví fólkið velur at skifta so út í Norðstreymoy, sigur Bárður:

– Mann er væl ikki nøgdur við støðuna sum er. Eg roknaði eisini við, at nú fer okkurt veruligt at henda. Eg ætli í øllum førum at gera mítt. Frá nú av skal tað henda nakað, sigur Bárður Nielsen.

Bárður arbeiðir til dagligt í Kollafirði,og hara hava tey tað við at standa saman um ein mann.

– Tað er nógvar leysar atkvøður í Kollafirði, og vanliga skiftur tað nógv her, sigur Bárður.

Seinasta val hjá Sambandsflokkinum í Norðsreymoy gjørdist eitt sera vánaligt val fyri flokkin, sum alla nýggjari tíð hevur havt valdømisvaldan tingmann í valdøminum. Hetta er so koma aftur í rættlag, kann mann siga.

Sambært Bárði er hetta eisini ein stórur partur av orsøkini til, at valið gjørdist so mikið gott hjá Sambandsflokkinum. Bárður heldur, at tað eisini vóru yngri fólk, ið valdu flokkin, og teir stillaður eisini tveir rættiliga ungar menn upp.

Tað, at Sambandsflokkurin nú fær innskotið nýtt blóð í tingmanningina, heldur Bárður eisini fer at ávirka flokkin.

– Tað fer at merkja eitt sindur, men vit fara ikki nærri fullveldi, sigur ein avgjørdur Bárður Nielsen.

Eitt sindur av muni hevur verið á valstríðnum í teimum ymsu bygdunum í Norðstreymoy heldur Bárður, men tað hevur serliga verið klassiski spurningurin um loysing og samband og vinnuligir spurningar, ið hava verið uppi og vent.



*Bárður Nielsen, nývaldur tingmaður og júst pápi fyri triðju ferð.*

## Fakta

**Navn**: Bárður á Steig Nielsen
**Aldur:** 30
**Bústaður:** Á Válinum Vestmanna
**Hjúnastøða:** Giftur, eigur 3 børn (eitt spildurnýtt)
**Uppstillaður áður:** Ja, í 1998 og fólkatingsvalið. Hevur verið aktivur í flokkinum síðani.
**Starv:** Roknskaparleiðari.
**Útbúgving:** HH og HD fyrsta part, umframt onnur fak innan roknskap

# Heðin Zachariasen

Í einum av ytstu skansunum í Streymnesi búleikast Heðin Zachariasen og hansara familja.

Hann er nýggjur tingmaður fyri Fólkaflokkin í Norðstreymoy. Hann er eykavaldur, og veljararnir góvu honum 149 atkvøður, og hetta var nóg mikið til eitt sæti á tingi.

– Eg gjørdist stórliga bilsin, tá eg frætti, at eg var komin inn, sigur Heðin Zachariasen.

Hetta er fyrstu ferð, at hann stillar upp. Hann hevur altíð valt Fólkaflokkin, so tað mátti vera hesin, ið hann stillaði upp fyri. Hann er tó eingin fremmandur fyri valinum, tí hann hevur seinastu 10 árini verið borgarstjóri í Hvalvíkar Kommunu. Afturat hesum arbeiðir hann eisini hjá IRF og so eigur hann saman við øðrum Handilskjarnan, Hanus og Janus og Schan.

Arbeiðir hjá IRF verður til eitt farloyi næstu tíðina, tí hann vil royna seg fult í tinginum.

Tað er ikki vanligt, at Streymnes eigur umboð á tingi. Heðin hevur eisini í valstríðnum roynt at tosa um eitt øki frá Kollafirði og norðureftir.

– Eg haldi, at fólk kanska hava sligið seg saman um meg her, men eg fekk atkvøður allastaðni, og á fleiri valstøðum tvífaldaðist Fólkaflokkurin, sigur Heðin.

– Tað er nógv lættari at sláa seg saman um ein persón í einari stórari bygd enn í fleiri smáum, sigur Heðin Zachariasen. Hann er samdur við tí sjónarmiðinum, at tað kanska er nakað langt úr Vestmanna til Tjørnuvíkar.

Til spurningin, um hví útskiftingin er farin fram, sigur Heðin:

– Tað sigur tað, at fólk vilja hava yngri kreftir at koma til.

Sjálvur er Heðin borgarligur, og hann fer eisini at leggja dentin á vinnuna. Hann ætlar sær at arbeiða fyri alt valdømið, men fyri ikki at gloyma, at hann er landspolitikari.

Í valstríðnum heldur Heðin, at tað hevur verið tosað nógv um loysing og samband, men tað hevur eisini verið tosað nógv um vegakervið í Norðstreymoy.

Heðin er fullveldismaður.

–Men tað skal byggja á eitt gott fíggjarligt grundarlag, sigur Heðin.

## Alt nýtt í Norðstreymoy

**Teir tríggir, ið vóru, vórðu útskiftir, og tríggir nýggir tingmenn umboða næstu fýra árini Norðstreymoyar valdømi.**

VALIÐ
*Orð: Heri á Rógvi*
*Myndir: Finnur Justinussen*

Í Norðstreymoyar valdømi var veljarin eirindarleysur. Tríggir nýggir tingmenn eru valdir. Bárður Nielsen úr Sambandsflokkinum, Niklái Petersen úr Tjóðveldisflokkinum og Heðin Zachariasen úr Fólkaflokkinum. Tað vórðu valdir í nevndu røð og Heðin Zachariasen er eykavaldur, tí Norðstreymoy fær tillutað tveir valdømisvaldar tingmenn.

Sambandsflokkruin fekk 694 atkvøður, Tjóðveldisflokkurin fekk 590, Fólkaflokkurin 538, Javnaðarflokkurin 480, Miðflokkurin 69 og Sjálvstýrisflokkurin fekk 52 atkvøður í Norðurstreymoyar valdømi.

Tað skal við til søguna, at sitandi fólkafloksmaðurin í Norðstreymoy, Jákup Suni Joensen, ikki stillaði upp til valið hesaferð.

Vit hava verið ein túr runt í valdøminum fyri at hitta nýggju tingmenninar.



*Hetta var fyrstu ferð, at Heðin Zachariasen stillaði upp.*



*Kollfirðingurin Niklái Petersen fekk dyggan stuðul á valinum týsdagin, og hann skal nú umboða Norðstreymoy í Løgtinginum.*

# Niklái Petersen

Í Kollafirði finna vit nýggja tingmannin hjá Tjóðveldisflokkinum í Norðstreymoy, Nikláa Petersen. 44 ára gamli skiparin royndi seg aftur til hetta valið, og tað bragdaði hjá honum. Við 225 persónligum atkvøðum gjørdist hann toppskoraði í valdøminum og fekk samstundis yvirtikið sæti hjá Jógvan Durhuus, sum hevur verið tingmaður í fleiri skiftum tey seinastu 32 árini.

– Mítt hjartamál er vinnumál. Hetta vil eg so avgjørt hava fram. Eisini má leggjast dentur á trivnaðarmál og ungdómurin má fáa sítt, sigur Niklái Petersen.

Hann er loysingarmaður og hevur altíð verið tjóðveldismaður. Hann vildi fegin havt ferð á fullveldistilgongdina, men tað verður óivað trupult við verandi samgongumøguleikum, heldur hann.

– Í valstríðnum her hevur nógv verið tosað um fleiri generel mál við tilknýti at vinnuni og umhvørvinum. Tað er fleiri staðni sera trongligt, sigur Niklái Petersen.

Hann heldur, at allur Norðstreymoy stóð saman og ikki bert ein kollfirðingar, sum tað ofta verður sagt.

– Vanliga hevur tað mesta sitið í Vestmanna, men nú er tað meira býtt millum bygdirnar. Eg haldi ikki, at fólk í Kollafirði bara velja persón, sigur Niklái.

Hann heldur, at tað má væl vera eitt ynski um broyting, at fólk í valdøminum skifta allar teirra tingmenn út.

Hann ætlar sær at leggja skipara yrkisleiðina á hillina – í øllum førum fyribils – nú hann skal royna seg í Løgtinginum.

## Fakta

**Navn:** Niklái Petersen
**Aldur:** 44
**Bústaður:** Kollafjørður
Hjúnastøða: Giftur, eigur eina døttur
**Uppstillaður áður:** Ja, í 1998 og fólkatingsvalið. Hevur verið aktivur í flokkinum síðani.
**Starv:** Skipari
**Útbúgving:** Skipsførari



# Nýggjur Teledepil

**Tað mesta av sambandinun, Føroya Tele hevur við sínar kundar, verður nú flutt oman í Miðbýin. Leygardagin letur nýggjur kundamiðdepil upp við navninum Teledepilin**

MIÐDEPIL
*Heri á Rógvi*



*Richard Mortensen, marknaðarstjóri hjá Føroya Tele, frammanfyri nýggja Teledeplinum, sum letur upp í dag.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Føroya Tele ætlar nú av álvara at brynja seg út. Teir hava í longri tíð fyrireika at gera ein tænastu miðdepil í Miðbýnum í Havn. Í hølunum, har Hon og Hann og Thomas Dam áður hava húsast verður ístaðin ein miðdepil hjá Føroya, kallaður Teledepilin.

Richard Mortensen, marknaðarleiðari hjá Føroya Tele, sigur, at teir við hesum stiginum vilja betra munandi um tænastuna.

– Við hesum vilja vit gera leiðina hjá kundanum meira beinleiðis, soleiðis at sleppast kann undan millumliðum, og alt verður savnað á einum stað. Kundar venda sær til okkum umvegis telefon og við at hyggja framvið hjá okkum. Nú vilja vit savna alt á einum stað, men tað ber sjálvandi framvegis til at ringja, sigur Richard Mortensen.

Í nýggja deplinum fara at starvast 28 fólk á 600 m2, og hetta eru øll fólk, ið hava beinleiðis samband við kundar, og hesi fara at kunna svara teimum spurningum, ið kundarnir koma við.

– Vit royna at vera tætt upp at fólkinum, tí verður depilin lagdur mitt í miðbýnum, sigur Richard Mortensen.

Í nýggju hølunum verður eisini Telebúðin flutt inn, soleiðis at alt verður savnað á einum stað.

Orsøkirnar til, at hetta stigið verður tikið eru fleiri. Talan er um eina týðandi íløgu fyri Føroya Tele, men teir eru vísir í, at hetta fer at geva avkast seinni.

– Vit hava gjørt fleiri kundakanningar, har vit hava fingið nakrar útmeldingar frá kundunum, sum gera, at vilja betra tænastuna. Eisini ávirkar kappingin sjálvandi, sigur Richard Mortensen.

### Noel og Anja

Til at seta sín dám á, at Føroya Tele nú letur hendan nýggja depilin upp, so verður skipað fyri ymiskum spennandi leygardagin. Umframt at latið verður eitt sindur av vátum og turrum og spennandi, so hava teir eisini fingið hendur á teimum báðum Noel og Anja, sum hava luttikið í sendirøðini Baren á TV3.

Tey bæði fara at skriva autografar og skeinkja sodavatn til tey, ið hava hug at hyggja framvið.

Enn er ikki alt liðugt, men leygardagin letur fyrsti parturin av nýggja deplinum, Telebúðin, upp. Seinni í mánaðinum verður alt væntandi liðugt, og tá letur restin eisini upp.

# Krígsbrotsverk men ikki hópmorð

**Ísraelski herurin framdi krígsbrotsverk í flóttafólkaleguni Jenin, men einki bendir á nakað hópmorð, sigur mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*

Amerikanski mannarættindafelagsskapurin Human Rights Watch hevur seinastu dagarnar kannað viðurskiftini í Jenin, og í einari frágreiðing, sum varð almannakunngjørd í gjár, sigur felagsskapurin, at eingi tekin eru til, at ísraelsmenn framdu hópmorð í flóttafólkaleguni, soleiðis sum palestinar vilja vera við.

Hinvegin staðfestir felagsskapurin, at ísraelsku hermenninir gjørdu seg sekar í krígsbrotsverki, tá teir hersettu leguna.

Í frágreiðingini sigur Human Rights Watch seg hava funnið líkini av 52 palestinum. 30 teirra vóru menn, sum bardust ímóti ísraelska herinum, og hini 20 vóru sivilfólk. Hetta samsvarar ikki við tað, sum ísraelska stjórnin hevur sagt. Stjórnin sigur, at av teimum 52 palestinunum, sum doyðu í Jenin, vóru sjey sivilfólk.

Human Rights Watch nevnir í frágreiðingini nøkur dømi um tað, sum felagsskapurin kallar krígsbrotsverk. M. a. verður sagt, at ísraelsku hermenninir skutu ein særdan palestina fleiri tímar aftan á, at teir høvdu tikið vápnini frá honum. Eisini verður sagt, at ein ísraelskir hermenn skutu ein 14 ára gamlan drong, sum var á veg til handils. Í einum øðrum føri skutu ísraelsmenninir ein 57 ára gamlan mann, sum sat í rullistóli. Aftaná koyrdi ein ísraelskur stríðsvognur á mannin.

Talsmaðurin hjá ísraelska herinum, Olivier Rafowicz, avsannaði í gjár tað, sum amerikanski mannarættindafelagsskapurin sigur. Talsmaðurin vildi vera við, at palestinararnir nýttu sivilfólk sum skjøldur í bardøgunum við teir ísraelsku hermeninar.

Danny Ayalon, ráðgevi hjá Ariel Sharon, forsætisráðharra, vísti eisini frágreiðingini hjá Human Rights Watch frá sær.

– Hetta var eitt krígsøki, sum var fult av bumbufellum og spreingievnum, segði Danny Ayalon í gjár.

Palestinski leiðarin, Yasser Arafat, hevur kallað Jenin tað nýggja Stalingrad.

ST-aðalskrivarin gjørdi hósdagin av at upploysa nevndina, sum skuldi kanna, hvat veruliga hendi í Jenin. Hann grundaði avgerðina á vantandi ísraelskan samstarvsvilja.

Ætlar tú at keypa
nýggjan bil
og
ongan brúktan
lata inn í býti? So ber til at gera
kvetti nú
Vit hava plásstrot vegna ov stórar goymslur av hesum modellum:
Mazda 626
Mazda Premacy
Mazda E2200 við trælast
Mazda E2200 innilokaður vørubilur
Mazda E2200 6 og 9 pers. Stationcar
Mazda B2500 RegCab, StrCab og DblCab, 4x2 og 4x4
Avsláttirnir eru frá
Kr. 20.000 og uppeftir
Leygardagin er opið í Havn og Klaksvík kl. 10.00-16.00
BERG MOTORS
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35
Klaksvík · Tel. 28 10 00